# Seyðahundakapping í Nólsoy

Tað er ikki bara barnaansing, ið upptekur nólsoyingar í hesum døgum. Nú leygardagin verður skipað fyri eini seyðahundakapping í oynni.

Fyriskiparin á staðnum, Rene Hansen, sigur, at kappast verður í t veimum av teimum trimum flokkunum, ið seyðahundarnir eru býttir upp í. Talan verður um 1. og 2. flokk. Men um fólk nú halda, at hetta eru bestu hundarnir, ið fara at kappast, er hetta ikki so kortini. Innan seyðahundaaling er 3. flokkur hin besti, og tað verða tískil teir ungu og eitt sindur óroyndu hundarnir, ið fara at royna seg.

Seinasta vikuskiftið varð skipað fyri einari líknandi kapping á Viðareiði, og har var undirtøkan sera stór , serliga í teimum báðum flokkunum, ið nú verður kappast í í Nólsoy. Tí vónar Rene Hansen, at nógvir luttakarar verða til kappingina leygardagin.

Kappingin fer fram Uppi á Brekkum, sum tað eitur, nærhendis Flaggstongini (sum er Føroya elsti viti). Kappingin byrjar kl. 10 fyrrapart og seinasta freist at melda til er í kvøld kl. 20, sigur Rene.

Hetta er aðru ferð, at seyðahundakapping verður fyriskipað í Nólsoy, fyrra ferð var í mars mánaði 2001.

Leygardag siglir Ritan kl. 7.55 og 9.30 um morgunin og 16.20, 19.00 og 22.00 seinnapart av Havnini.

Tilmeldingin fer fram á tlf. 219979.



nólsoyingum undir við samanleggingini, sum longu varð ein veruleiki frá 1. Januar 2005.

Og um nólsoyingar hava dugað serliga væl at samráðast, ella havnin var so altráð at fáa Nólsoy undir sínar veingir, er ilt at siga, men eingin annar samanleggingarsáttmáli, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt, hevur givið lítlu kommununi so nógv lyftir.

Og eitt av hesum lyftum - og samstundis eisini tað nógv størsta - var, at samanlagda kommunan í fylgjandi valskeiði bant seg til at byggja ein barnagarð í Nólsoy. Mettur prísur: 8 mió. kr.

## Flyta inn

Um hetta mundið var barnatalið í ansingini vaksið til 21 børn, íroknað frítíðarskúlan. Longu tá var um at gerast heldur trongligt, tí tey serkønu mettu, at stovnurin kundi nominerast til 20 børn.

Nýggja býráðið gjørdi eisini skjótt av við projektering og útbjóðing. Longu áðrenn kommunurnar vórðu lagdar saman syrgdi Nólsoyar kommuna fyri útgrevstri og planering soleiðis, at klárt var at fara undir bygging beinanvegin. Eisini tá fráfarandi býráð fór í gongd, og fyribils útbjóðingartilfarið var gjørt, áðrenn nýggja býráðið tók við.

Sitandi býráð tók við har undanfarna slepti, og tað gekk bert stutt tíð, so var klárt at fara undir bygging av stovninum.

Drúgt hevur verið at bíða hjá starvsfólkunum eftir nýggja stovninum. Fleiri ferðir hevur tíðarætlanin verið togd og avhendingardagurin útsettur. Veður og vindur eiga sín part, vanligt óhepni sín part av seinkingini, men nú er so um at koma undir land, og í vikuni hevur dúgliga verið rokast við at gera bygningin reinan.

Enn er kortini nakað eftir at gera, og eitt nú er økið uttanum barnagarðin ikki liðugt enn, men sum skilst verður astfalterað í næstu viku. Heldur ikki er alt innbúgv komið enn, men so væl líðir, at flutt verður inn komandi mánadag.

Og tað verður ein rættilig kollvelting fyri starvsfólkið, tí einki er at taka seg aftur í, at talan er um ein av allarsnotiligastu stovnunum í landinum. Børnini liva allarhelst í eydnusamari óvitan um trongu umstøðurnar, og hvussu rúmligt og spennandi alt verður frá mánadegnum av.

## Einki líknandi sæð

Lis Nolsø hevur verið leiðari fyri barnaansingini í Nólsoy seinaastu 4 árini. Og bert í hennara tíð er nógv broytt.

- Tá eg kom her vóru børnini 15 í tali, nú verða tey 34. Verandi høli eru alt ov trong, neyðugt er at beina alt burtur, skulu vit t. d. eta. Starvsfólkini hava heldur einki rúm til sín sjálvs, og hølini eru stutt sagt vorðin alt ov lítil. Eisini vænti eg, at størru hølini fara at minka um ósemjurnar millum børnini, sigur Lis.

Sum nevnt er húsið bygt sum missiónshús, og tí er dentur lagdur á onnur viðurskifti, enn um bygt var til ansingarstovn. Eitt nú eru ljóðviðurskiftini sera vánalig fyri børnini. Men størsti trupulleikin er trongu hølisviðurskiftini.

- Umstøðurnar fyri børn og starvsfólk verða so ófatiliga nógv betri í nýggju hølunum. Eg eri eisini sannførd um, at alt fer at rigga væl á nýggja stovninum, hví skuldi tað ikki tað. Og eg má eisini siga, at mær dámar bygningin sera væl, havi ikki sæð nakran líknandi ansingarstovn nakrastaðni, sigur Lis Nolsø.

Og bygningurin er serligur. Talan er um tríggjar lonir, sum standa í lítlum vinklum í mun til hvørja aðra. Eitt annað slóðbrótandi nýtt er, at stórur partur av upphitingini fer fram umvegis sólfangarar.

Lis Nolsø sigur, at tey longu í dag byrja at pakka niður tað, ið skal flytast, og verður flutt um vikuskiftið.

- Tað ber ikki til at lata aftur vegna flyting, tí tað rakar so mong foreldur. Tí hava vit valt at flyta alt um vikuskiftið soleiðis, at vit eru klár at taka ímóti børnunum í nýggju hølunum mánamogrunin, sigur Lis.

Tað er arkitektafyritøkan Albert Isfeldt og Gudmund Hansen, ið hava teknað bygningin, meðan byggifyritøkan Hans V. Lützen hevur staðið fyri arbeiðinum.



*Nýggi ansingarstovnurin er bæði snotiligur og sermerktur. Eitt av sermerkjunum er, at stórur partur av stovninum verður upphitaður við sólorku*

# Føroyingur við hundum yvir Finnmarksslættan




*Jákup Hans Heinesen saman við hundunum á Finnmarksslættanum. Tíverri gjørdi mateitran at hann ikki fekk luttikið undir allari kappingini, men hann ætlar sær at kom á mál*

*(Mynd: Finnmarkslopet.no)*

**Sjálvt um mateitran forðaði honum í at halda fram í kappingini, so ætlar Jákup Hans Heinesen at koma sær ígjøgnum kappingarleiðina um Finnmørkina hesa vikuna**

*Jógvan Hugo Gardar, Oslo*
*info@flesjar.no*

**Oslo:** Finnmarksløpet er hæddarpunktið fyri norðurlendskar hundakoyrarar. Kappingin lokkar hundaeigarar og hundakoyrarar úr øllum heiminum, men serliga úr norðanlondum. Í ár stóð føroyingurin Jákup Hans Heinesen á startlistanum.

Úr Finnmark frætta vit, at Jákup Hans byrjaði kappingina einsamallur, uttan hjálparfólk. Tey flestu hava hjálparfólk við sum hjálpa til, tá bunkrast skal ávegis.

## Mateitraður

Tíverri gjørdist kappingin stutt hjá føroyska hundakoyraranum. Tá Jákup Hans Heinesen ikki kom fram til fyrsta steðgipláss og kontrollpunkt, varð farið at leita eftir honum. Tað vísti seg, at mateitran hevði forðað honum og hundunum í at halda ferðini uppi.

Hann noyddist tí at taka seg burturúr kappingini, men sunnukvøldið segði hann í samrøðu við fyrireikararnar, at hann vildi halda fram ferðina so leingi hann megnaði, sjálvt um hann ikki luttók í sjálvi kappingini. Hetta hevur hann møguleika til.

## Heldur fram

Jákup Hans Heinesen kom sunnudagin fram til steðgistaðið Joatka, har hann skuldi hvíla seg nakað, áðrenn hann helt fram. Í samrøðu við heimasíðuna hjá Finnmarkløpet (www.finnmarkslopet.no) sigur Jákup Hans, at sæð í baksýnið, so skuldi hann ongantíð verið farin av stað, tí hann var mateitraður longu áðrenn byrjan.

– Men tá so nógv fólk er til staðar, og hýrurin er góður, so er ringt at lata vera við at fara avstað. Hundarnir hava tað gott, sjálvt um sletan er so tung sum hon er.

Mánadagin er hann áveg til Skoganvarre, og vónaði at heilsan var so mikið fræg tá, at hann kundi halda fram allan vegin.

Jákup Hans Heinesen sigur at hansara mál við luttøkuni ongantíð hevur verið at kappast í toppinum, men at sleppa at ganga tvørturum Finnmarksslættan saman við hundunum.

## FAKTA

Finnmarksløpet er norðalagasta kapping við hundasletum. Í ár er 27. ferðin at kappingin verður gjøgnumførd. Talan er um tvær kappingar sum byrja sama dag – onnur er 500 kilometrar long og kann hundakoyrararin hava átta hundar við sær, meðan longri teinurin er 1000 kilometrar og møguligt er at hava 14 hundar við sær.

Kappingin byrjar í Alta í Vestur-Finnmørkini og fyrst gongur leiðin til Kirkenes í Eystur-Finnmørk, har vent verður og síðani gongur leiðin aftur móti Alta.

Styttra kappingin heldur seg yvirhøvur á Finnmarksslættanum.